# Umhugsar tú egið orkuverk við sólorku ella vatnorku?

Allir elkundar kunnu seta upp smáverk á í mesta lagi 200 kW at framleiða elorku til egna nýtslu og inn á netið hjá Sev. Uppseting av smáverkum skal gerast í samstarvi við góðkendan elinnleggjara.



## Sólorkuverk á egna tekju minni enn 11kW

### Soleiðis gert tú

1. Set teg í samband við góðkendan elinnleggjara. Elinnleggjarin sendir Sev umsókn, og tryggjar sær, at orkuverkið lýkur teknisku krøvini hjá Sev fyri íbinding áðrenn orkuverkið verður sett upp.
2. Kanna, um neyðugt er við byggiloyvi í tínari kommunu.
3. Ger avtalu um uppseting av verkinum. Hetta kann vera við seljaran, elinnleggjara ella aðra fyritøku, ið hevur røttu førleikarnar.
4. Elinnleggjarin avgreiðir íbinding í elskipanina.
5. Tá elarbeiðið er liðugt og endaliga góðkent av Sev, er klárt er at fara undir egna orkuframleiðslu.

## Vatnorkuverk minni enn 11kW

### Soleiðis gert tú

1. Set teg í samband við góðkendan elinnleggjara. Elinnleggjarin sendir Sev umsókn, og tryggjar sær, at orkuverkið lýkur teknisku krøvini hjá Sev fyri íbinding.
2. Kanna, um neyðugt er við byggiloyvi í tínari kommunu.
3. Søk um vatnloyvi frá Umhvørvisstovuni.
4. Ger avtalu um uppseting av verkinum. Hetta kann vera við seljaran, elinnleggjara ella aðra fyritøku, ið hevur røttu førleikarnar.
5. Elinnleggjarin avgreiðir íbinding í elskipanina.
6. Tá neyðug loyvi fyriliggja, elarbeiðið er liðugt og endaliga góðkent av Sev, er klárt er at fara undir egna orkuframleiðslu.



# Tú hevur valt tær eitt orkuverk størri enn 11kW og minni enn 200kW

## Soleiðis gert tú

1. Set teg í samband við góðkendan elinnleggjara. Elinnleggjarin sendir Sev umsókn, og tryggjar sær, at orkuverkið lýkur teknisku krøvini hjá Sev fyri íbinding.

   Fyri orkuverk størri enn 11kW er neyðugt er við hesum loyvum:

   - framleiðsluloyvi frá Umhvørvisstovuni,
   - vatnloyvi til vatnorkuverk,
   - loyvi frá Sev til íbinding í elnetið,
   - møguligt byggiloyvi frá kommununi.

2. Tú gert avtalu um uppseting av verkinum við seljaran, elinnleggjara ella aðra fyritøku, ið hevur røttu førleikarnar.

3. Elinnleggjarin avgreiðir íbinding í elskipanina, herundir ger klárt til serstakan framleiðslumálara.

4. Tá øll neyðug loyvi fyriliggja, elarbeiðið er liðugt og endaliga góðkent av Sev, er klárt er at fara undir egna orkuframleiðslu.

### Invertarar

Fyri sólorkuverk er umráðandi at finna rætta invertaran. Keypir tú sólskipan til at binda í elnetið hjá Sev, er neyðugt við einum góðkendum invertara. Tú kanst tryggja tær, at invertarin er góðkendur, við at kanna listan hjá Green Power Denmark yvir góðkendar invertarar.

**GG!** Bert invertarar til tríggjar fasur eru góðkendir av Sev.



## Prísir

Prísurin, sum tú fært fyri sølu av elorku frá egnum orkuverki inn á netið hjá Sev, er at finna á heimasíðuni hjá Sev www.sev.fo

## Nærri kunning

Nærri kunning er á heimasíðuni www.sev.fo. Hevur tú spurningar viðvíkjandi skipanini við smáverkum, kanst tú seta teg í samband við Eyðun Djurholm leiðara á Innleggingardeildini, á tel. 346800 ella í telduposti: ed@sev.fo

www.sansir.fo

**Sev**
Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn

+298 346800
sev@sev.fo
www.sev.fo